# Fyrsta framleiðsluvirki í Sandvík í nýggjari tíð

*Tá í Seymistovan í Sandvík læt upp stutt fyri jól, var tað ein søgulig hending, tí hetta er fyrsta framleiðsluvirki í bygdini í nýggjari tíð*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tann føroyska ullin er so góð, at vit hava óendaligar møguleikar við henni.

Hetta eru slagorðini undir einum nýggjum arbeiðsplássi, sum nú er sett á stovn í Sandvík.

Tað er Vónbjørt á Hólum í Sandvík, sum hevur gjørt eina seymistovu, sum seymar ymiskt pløgg burturúr føroyskari ull.

Men hetta er ikki bara eitt arbeiðspláss, sum byggir á gamla føroyska mentan.

Hetta er eisini eitt søguligt arbeiðspláss, tí hetta er fyrsta framleiðsluvirki í bygdini í nýggjari tíð.

Og hetta er eitt av teimum heilt fáu arbeiðsplássunum, sum yvirhøvur eru í bygdini.

Tey arbeiðspláss, sum annars eru í Sandvík, er eitt posthús, sum Postverkið av neyð hevur opið tríggjar tímar um vikuna, bara tí at løgtingið hevur álagt tí at hava posthús í Sandvík, eins og í øðrum bygdum.

Annars er ein lítil handil í bygdini.

Somuleiðis ger tann nýtímans tøknin, at tað eisini ber hjá Sosialinum at hava eina blaðstjórn í Suðuroynni og hon er í Sandvík, har undirritaði blaðmaður er einsamallur í starvi.

Men so er søgan eisini søgd um arbeiðsplássini í Sandvík nú á døgum, tí skúlalærarin í bygdini er úr Hovi, so hann telur ikki við.



*Tær tríggjar, sum manna seymistovuna í Sandvík hava nóg mikið at gera. Fremst á myndini er tað herdis Jensen, í miðjuni, Vónbjørt á Hólum, stigtakari, og aftast. Ingdrid Nielsen*

Allir hinir sandvíkingarnir, sum arbeiða, eru antin sjómenn, ella teir arbeiða uttanbíggja og onkur ger fyrifallandi arbeiði fyri kommununa, men tað er bara av og á.

### Gott eyga á ullini

Vónbjørt á Hólum sigur, at hon hevur leingi havt gott eyga á teirri føroysku ullini, sum hon sigur, skarar framúr.

Hon er sterk og so hevur hon tann vælsignaða eginleika, at hon er ógvuliga heit ið tað er kalt, men kortini svallig, tá ið tað er heitt.

Men tá ið hon so frætti, at Ullavirki í Vági sendi pløgg kring alt landið at seyma saman, og enntá til íslands í einstøkum føri, fór hon at kanna um tað ikki kundi bera til at savna seymingina í Suðuroynni, tí hon helt, at tað átti at verið ein fyrimunur, at hava seymistovuna nærri Ullavirkinum.

Hon kannaði málið og fekk samstarvsavtalu í lag við Ullavirki um at seyma fyri tey.

Tí leyp hon í tað og setti seymistovina á Stovn í leigaðum hølum í Sandvík.

Tey byrjaðu so smátt í setember mánaða í fjør, men síðani hevur tað bara vundið uppá seg.

Hon hevur alla tíðina havt tvey fólk afturat sær á seymistovuni.

Í fyrstuni arbeiddu tey hálva tíð. Men skjótt bleiv tað so nógv at gera, at tey máttu uppá fulla tíð og tað hava tey gjørt síðani.

### Seyma eisini fyri fólk

Vónbjørt á Hólum sigur, at tey hava so nógv niðurfyri, at útlit eru til, at talan verður um varandi arbeiðspláss, ikki minst nú nógv av teimum pløggunum, sum Ullavirki selur, verða seymað í Sandvík.

Og tað er júst samstarvið við Ullavirki, sum er tað berandi í seymistovuni í Sandvík.

Men tey seyma eisini alt møguligt fyri fólk, tí tey bæði leggja buksur upp, seyma snarlás í, broyta jakkar, frakkar og onnur pløgg og tey hava enntá eisini seymað dukkuklæðir, onkur sandala hevur eisini verið undir nálini at seyma reimina fasta, so eisini hesin parturin av virkseminum vindur meiri og meiri upp á seg.

Tað, tey seyma fyri Ullavirki, eru troyggjur, jakkar, frakkar kot, húgvur o.s.fr.

Og tað er sjálvandi alt úr ektaðari , førosykari ull, ið ongi sum helst litevni, ella onnur evnafrøðilig evni eru koyrd í.

Og knapparnir í teimum ymsu pløggunum, teir eru úr horni- so føroyskari fær tað ikki verðið.

### Sum at standa á einum radiatori

Men Vónbjørt hevur eisini sjálv fingið hugskotið til aðrar vørur, sum hon ger burturúr føroyskari ull frá Ullavirkinum.

Serliga væl hava fólk dámt leistarnir, ella sólarnar, sum tey hava seymað.

Teimum hevur hon selt rættiliga nógv av.

Ikki minst hava fólk, sum standa kalt tá ið tey arbeiða, eitt nú á einum vátum flakavirkisgólvið, verið sera væl nøgd við hesar ullintu sólarnar, tey siga, at tað er sum at standa á einum radiatori.

Men tey seyma eisini bind til at hava um knø og skøvningar, og hetta hevur verið væl dámt hjá fólki, sum hava gikt, ella hava aðra pínu í í skøvningunum og knøunum, tí tað er so heitt.

Og nú eru tey eisini farin at seyma skóleistar.

Men hugskotini til, hvat kann gerast burturúr føroyskari eru nógv og tað verður sett í verk so hvørt, umstøður verða til tess.

–Møguleikarnir við teirri føroysku ullini eru óavmarkaðir sigur hon.

Hon vísir samstundis aftur, tí sum sagt verður, at føroyska ullin er ikki nóg sterk.

–Ráðini eru at tøva hana, so verður hon sterk.

Men hon heldur, at skulu vit fáa nakað munagott burturúr hesum frálíka náttúrutilfeingi, vit hava, krevst eisini ein hugburðsbroyting, so at fólk geva henni gævur og eru meiri tilvitað um at tey ullintu pløgg, tey hava, skulu vera úr føroyskari ull.

Hóast tey hava nóg mikið at gera á Seymistovuni, eru ongar ætlanir um at víðka virksemið enn.

– Í løtuni er ikki arbeiði til meiri enn okkum tríggjar, sum nú eru. Men verður tað munandi meiri at gera, mugu vit sjálvandi hugsa um at økja manningina, sigur Vónbjørt á Hólum.



*Her vísa tey nøkur pløgg fram. Frá vinstru eru tær Herdis Jensen og Ingrid Nielsen, sum báðar arbeiða á seymistovuni. Næst uttast til høgru stendur Maja Olsen, sum er stokkin inn á gólvið í barnaheiminum, har Seymistovan er. Ytst til høgru stendur Vónbjørt á Hólum, sum tók stig til hetta nýggja arbeiðsplássið*

# Gongur framá - men spakiliga

ÁKI BERTHOLDSEN

Ullavirkið í Vági fer nú at gera meiri burturúr at markaðarføra pløggini, sum eru virkað úr føroysku ullini.

M.a. fara tey at lata handil upp í Vági, har pløggini frá ullavirkinum skulu seljast.

Handilin verður í gomlu krambúðini á Gørðum, sum Ullavirkið hevur leigað til handil.

Árni Brattaberg á Ullavirkinum sigur, at ætlanin er at lata upp mikudagin 16. februar.

### Gongur framá

Annars sigur hann, at tað gongur alsamt betri og betri at sleppa av við pløggini, sum eru virkað úr føroyskari ull, tó tað er spakiligt.

Ikki minst í Vági eru tað mong, sum hava fingið sær okkurt føroyskt plagg, men aðrastaðni í Føroyum gongur tað meiri strilti enn.

Tó sigur hann, at tað verður meiri og meiri flutt út. Eitt nú hava tey sent pløgg til Grønlands og til Danmarkar.

Men ikki minst er hann bjartskygdur um norska marknaðin, tí hann sigur, at tað er næstan ikki dagur, at ikki okkurt plaggið verður sent til Noregs, og tað vindur alsamt uppá seg. Men tað eru ikki so nógv føroyingar í Noregi, sum keypa.

– Tað eru tvørurímóti norðmenn, sum hava fingið eyguni upp fyri dygdini í føroysku ullini, sigur Árni Brattaberg.

Hann sigur, at talan er um fólk, sum fólk, sum eru nógv úti, sum eru farin at keypa frá Ullavirkinum.

Og Árni Brattaberg heldur, at framtíðin hjá Ullavirkinum liggur kanska líka nógv í útflutninginum, heldur enn í heimamarknaðinum.

### Nýggjar vørur

Tað, at øll pløggini frá ullavirkinum eru úr ektaðari, føroyskari ull, ger, at litirnir eru ikki so nógvir, tí hvørki litevni, ella onnur evni eru koyrd í ullina. Fyribils hava tey fimm litir, hvítt, ljósagrátt, myrkagrátt, umframt ljósa- og myrkamorreytt.

Men nú fara tey eisini at gera skjórut pløgg. Eitt skjórut plagg er eitt fleirlitað plagg, har allir litirnir renna saman, so at ongin er sjónskur.

Í hesum førinum verður talan um tvílitað pløgg.

Umframt Fjallatroyggjurn, kot o.a., arbeiða tey eisini við at gera annað burturúr ullini, og okkurt nýtt er longu á veg. Eitt nú eru tey farin at gera taskur og buksur og tað riggar eisini avbera væl, sigur Árni Brattaberg.

Í løtuni eru tey fýra fólk á Ullavirkinum, umframt tey, sum seyma.



# Í býin - altíð eitt stað at fara

## Streymoy

Kaggin
Live music Kaggin
Fríggja-og leygarkvøldið spæla RUN AWAYS
Leygarkvøldið verður boksikampur millum Tyson og Francis kl. 20.00 á stórskíggja
Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Manhattan PUB & CAFÉ
Hóskvøldið 27. feb. frá kl. 21.00-23.30
LIVE JAZZ
Eivør Pállsdóttir Kvartet
Manhattan PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn Tel 31 96 96
Casablanca
FRÍGGJAKVØLDIÐ 28.01 KL.23.00-03.30
DISKOTEK
18 ára aldursmark
STAMKORT ÓKEYPIS ATGONGD

fk Matseðilin
Hósdagin 27. jan. Barbequerib
Fríggjadagin 28. jan. Skinkusnitzel
Leygardagin 29. jan. Culottusteik
Mánadagin 31. jan. Kjøtfrikadellur
Týsdagin 1. feb. Fiskur í fati
Mikudagin 2. feb. Lasagna
Kostnaður 30,- kr
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spæla MOON-SHOT
Sosialurin - 311820

Kinesiska matstovan Nantong
Hósdagin 27/1 Hakkibúffur v/brúnari sós
Fríggjadagin 28/1 Svínakjøt í soyasós
Mánadagin 31/1 Oksakjøt í karrysós
Týsdagin 1/2 Høsnarungi í tomatsós
Mikudagin 2/2 Lambakjøt v/piparsós
Døgurða menu kr. 45,-
Út av húsinum kr. 40,-
Opið: Mánadag- fríggjadag á døgurða kl. 11.30-14.00
南 通
Tinghúsvegur 8 - 3. hædd
Postrúm 121, 110 Tórshavn
Tel. 31 86 98 / 32 03 83
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

TAXA
MINI BUSS 3X21

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN DIESEL KIOSK
- ALTDØGNIÐ -
AUTO 311234

## Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 29/1
"JAN GARDAR" vendir plátum
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY
Sosialurin - 311820

sosialurin

### Vilja tygum vi› í

### í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur